UTTAN ÚR HEIMI

# Vandi fyri at 100 milliónir fara at líða hungur



*Verður einki munagott gjørt, fara 100 milliónir fólk at líða hungur um fá ár*

Mynd: Reuter

**Sum er líða 11 milliónir fólk hungur í Eysturafrika orsakað av turki, men serfrøðingar bera ótta fyri, at um fá ár fara 100 milliónir fólk at svølta**

HUNGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í Kenya orka húsdjórini ikki at standa á beinunum, tí tey hava einki at eta, og bøndurnir fáa lítið og einki fyri tey deyðu djórini, tí tey eru at kalla bara skinn og bein. Í Somalia doyggja fólk av vætutroti á veg til brunnarnar, og sum altíð eru tað børnini, sum líða mest.

ST hevur sett sær fyri at, at í 2015 skal talið á svøltandi fólki verða helvtina minni enn í dag, men serfrøðingar bera ótta fyri, at tað fer at ganga tann øvugta vegin, og at talið heldur verður fleirfaldað tey næstu níggju árini.

Matvørustovnurin hjá ST, WFP, bað longu í heyst altjóða samfelagið hjálpa teimum nógvu svøltandi í Eritrea, Djibouti, Somalia og Kenya, tí at 6,2 milliónir fólk har høvdu hjálp fyri neyðini. Nú sigur WFP, at talið er 11 milliónir, og at tað veksur dag frá degi.

Hjálparfelagsskapurin Oxfam kunngjørdi fyri stuttum eina frágreiðing um støðuna í Somalia. Har verður millum annað sagt, at fleiri hundraðtúsund fólk fáa bara trý gløs av vatni um samdøgrið, og tað skulu tey brúka til matgerð, reingerð og til at drekka. Mong royna at ragga sær til keldur og brunnar eftir vatni, men fleiri og serliga børn doyggja á vegnum av vætutroti.

– Eingin kann liva við trimum gløsum av vatni í 40 stiga hita, sigur Mohamed Elmi, sum er deildarleiðari hjá Oxfam, við Reuters.

Danin Per Pinstrup-Anderson, sum er stjóri á altjóða matvørugranskingarstovninum IFPRI, segði á einari ráðstevnu herfyri, at við verandi gongd hevur altjóða altjóða samfelagið ongan møguleika at røkka málinum um at skerja talið á teimum svøltandi eina helvt innan 2015. Tvørturímóti helt hann, at vit fara at hava umleið 100 milliónir svøltandi um níggju ár, verður einki munagott gjørt. Tað fer at fáa avleiðingar.

– Hetta er sera harmiligt og fer at gera heimin til eitt vandamikið stað. Fleiri verða eggjað til at fremja yvirgang fyri at vísa sína misnøgd við tann altsamt veksandi munin á ríkum og fátækum, segði Per Pinstrup Anderson.

# Loyniligar samráðingar um Ratko Mladic

**Tað er væl hugsandi, at serbisku myndugleikarnir hava funnið Ratko Mladic, sjálvt um hann ikki er tikin enn**

SERBIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tað áliggur serbisku stjórnini at handtaka Ratko Mladic og at útflýggja hann til rættarsókn í Haag.

Tað var viðmerkingin hjá høvuðsákærpranum í Haag, Carla del Ponte, tá serbiskir fjølmiðlar fyrradagin hildu uppá, at generalurin var tikin. Seinni avsannaði stjórnin í Beograd tíðindini í fjølmiðlunum, og tað gjørdi Carla del Ponte eisini.

Men eygleiðarar halda, at tað er væl hugsandi, at serbiska stjórnin hevur fingið samband við generalin, men at hon roynir at fáa hann at geva seg yvir, so hon kann sleppa undan at taka hann við makt og at noyða hann til Haag.

Eygleiðararnir vísa á, at serbiski forsætisráðharrin, Vojislav Kostunica, var ímóti avgerðini hjá undanmanni sínum at senda Slobodan Milosevic til Haag ímóti hansara vilja. Tí kann hann ikki útflýggja Mladic, uttan so at hesin játtar at fara sjálvboðin, siga eygleiðararnir.

Ein ónevnd kelda í serbisku tryggdartænastuni segði við AP í gjár, at stjórnin í Beograd kann væl hava fingið samband við Ratko Mladic, uttan at hon hevur sagt dómstólinum í Haag frá.

Norski Balkan-serfrøðingurin Svein Mønnesland tekur undir við hesum sjónarmiði. Hann vísir á, at 15 serbar, sum eru undir illgruna fyri krígsbrotsverk, hava givið seg yvir til myndugleikarnar, síðani Kostunica tók við. Eingin veit, hví teir valdu at geva seg yvir, men tað er ikki óhugsandi, at pengar eru uppií, ella at aðrir hava fingið grið afturfyri, sigur Mønnesland við Aftenposten.

– Tað er ikki óhugsandi, at stjórnin í Beograd er til reiðar at lata Mladic fleiri milliónir krónur afturfyri, at hann gevur seg yvir, sigur norski Balkan-serfrøðingurin.

## Demokratiskt val í Uganda

Í gjár var val í Uganda, og fyri fyrstu ferð høvdu veljararnir høvi at velja ímillum valevni úr fleiri flokkum.

Eygleiðarar halda kortini, at gamli forsetin, Yoweri Musuveni, fer at fáa meiri enn 50 prosent av atkvøðunum, so hann sleppur undan einum valumfari afturat. Hann hevur sitið við valdið í Uganda seinastu 20 árini, og herfyri skipaði hann so fyri, at grundlógin bleiv broytt, so hann slapp at stilla upp eina ferð afturat.

Hóast valið verður kallað demokratiskt, hevur andstøðan ikki havt tær bestu umstøðurnar upp undir valið. Í november í fjør bleiv andstøðuleiðarin, Kizza Besigye, tikin og skuldsettur fyri neyðtøku og landasvik. Hann var júst komin aftur til Uganda eftir at hava verið í útlegd síðani valið í 2001, tá hann mátti lúta fyri Musuveni.

Herfyri segði Musuveni, at hann heldur seg hava stýrt Uganda væl seinastu 20 árini, sjálvt um uppreistrarherurin Harrans Mótstøðuherur hevur rikið hálva aðru millión fólk frá húsi og heimi har norðuri í landinum. Uppreistrarherurin er kendur fyri sín óhugnaliga harðskap og hevur millum annað burturflutt nógv túsund børn og brúkt tey til hermenn ella trælir.

## Nógv arbeiða yvirtíð

80 prosent av teimum, sum eru virkin á danska arbeiðsmarknaðinum, atbeiða meiri enn teir ásettu 37 tímarnar um vikuna, og ein kanning vísir, at tey fáa annaðhvørt frídagar ella pengar afturfyri.

Kanningin, sum fakfelagið HK hevur gjørt, vísir, at 20 prosent arbeiða yvirtíð hvørja viku, onnur 20 prosent arbeiða ofta yvirtíð, og 40 prosent siga, at tey arbeiða yvirtíð av og á. Bara tey seinastu 20 prosentini siga, at tey hava ongantíð yvirtíð.

HK heldur ikki, at tað er nakar trupulleiki, at so nógv fólk arbeiða meiri enn ta sáttmálasettu arbeiðstíðina. Felagið vísir á, at tað hevur sjálvt gjørt sáttmálar, sum loyva yvirtíð, og tí er tað sjálvandi í lagi, at hesin møguleikin verður brúktur.

## Myndamenn dømdir

Dómsvaldið í Fraklandi hevur dømt tríggjat franskar myndamenn fyri at hava tikið myndir av Dianu prinsessu og unnusta hennara, Dodi Al Fayed, áðrenn og aftan á bilvanlukkuna, sum kostaði teimum og bilførara teirra lívið í august í 1997.

Myndamenninir vórðu dømdir fyri at hava gjørt seg inn á privatlívið hjá fólki, sigur BBC. Teir tríggir vórðu fríkendir í einum øðrum rætti í París í 2003 og 2004, men eftir trýsti frá pápa Dodi Al Fayed, Mohamed Al Fayed, gjørdi dómsvaldið av at taka málið uppaftur. Hesaferð fingu myndamenninir bót.

Teir tríggir myndamenninir tóku fyrst myndir av Dianu of Dodi Al Fayed, tá tey fóru úr Riz-hotellinum. Seinni tóku teir eisini myndir av teimum báðum, meðan tey sótu føst í bilinum í Alma-tunlinum.

## Genta gift við hundi

Ein sjey ára gomul genta har eysturi í India varð nú um dagarnar gift við einum hundi, tí ættarfólk hennara vilja vera við, at á tann hátt kann ættin sleppa undan einari bannlýsing, sum plágar ættina.

Avgerðin at lata gentuna giftast einum hundi bleiv tikin, tí tað vísti seg, at tenninar í yvirmunninum hjá gentuni komu undan, áðrenn nakað sást til tenninar í undirmunninum, skrivar AP. Gentan og foreldur hennara eru úr ættarbólkinum Santhal, og har halda tey, at tað boðar frá vanlagnu, um tenninar í yvirmunninum koma fyrst, og at tann einasta loysnin er, at gentan verður gift einum hundi.

Sambært AP stóð brúdleypið í tríggjar dagar eftir gomul siði hjá Santhal-fólkinum. Pápi gentuna sigur tó, at tað stendur gentuni frítt at gifta seg aftur seinni og tá við einum manni, vil hon tað.